# Tann seinasti transatlantikarin segði farvæl

Ósemjan um innrásina í Irak var tann største innanhýsis avbjóðingin, sum NATO nakrantíð hevur havt, men Colin Powell fekk bara rósandi orð, tá hann fyrradagin var í Bruxelles og segði sínum starvsbrøðrum farvæl




*Fyrradagin var Colin Powell í Bruxelles og segði farvæl, nú hann leggur frá sær sum uttanríkisráðharri*

*Mynd: Reuters*

Hósdagin vóru uttanríkisráðharrarnir í NATO-londunum komnir saman til fundar í Bruxelles. Men teir høvdu eisini eini onnur ørindi: At siga amerikanska uttanríkisráðharranum farvæl.

Tí hóast tað júst var í hansara ráðharratíð, at NATO hevði sína ringastu innanhýsis kreppu higartil, stúra teir flestu leiðararnir evropeisku megin Atlantshavið fyri, at tann nýggja Bush-stjórnin verður ikki léttari at dansa við. Í Bruxelles var semja um, at tey fýra árini sum uttanríkisráðharri hevur Colin Powell verið sum ein nýskapandi íbirtari samanborið við tær nýkonservativu kreftirnar í Washington.

- Powell hevur altíð verið ein sannførdur transatlantikari, segði týski starvsbróður hansara, Joschka Fischer, sum hevði mangan dystin við amerikonsku leiðsluna í fjør um kríggið í Irak. Tað var fyrstu ferð síðani seinna heimsbardaga, at Týskland setti seg upp ímóti amerikanska uttanríkispolitikkinum og tað við harðari rødd.

- Okkara samstarv var merkt av opinleika og virðing - eisini um tey mál, sum vit vóru ósamdir um, segði Joschka Fischer.

### Ikki lætt

Danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, ásannar, at tað var ikki lætt hjá Colin Powell at fáa evropearararnar at skilja amerikanska uttanríkispolitikkin. Álopini á USA tann 11. september í 2001 hava broytt viðurskiftini í heiminum so nógv, at tað slapst ikki undan ólagi í samstarvinum tvørtur um Atlantshavið, sigur Per Stig Møller.

- Heimurin er ein heilt annar í dag enn fyri fýra árum síðani, tá Powell tók við. Hann hevur havt stórar trupulleikar, sum hann noyddist at taka sær av, segði danski uttanríkisráðharrin og vísti á bardagan ímóti yvirgangi og tað, sum er hent í Afganistan og Irak.

- Colin Powell skilti, at tað var umráðandi at hava gott samband við okkum hesumegin Atlantshavið. Vit kunnu vera ósamd, men tá ræður um at virða sjónarmiðini hjá hvør øðrum, so samstarvið kann halda fram, sigur Per tig Møller.

### Hyggja frameftir

Sjálvur vísti Colin Powell á, at USA og Evropa skulu halda fram at virka og at samstarva, men at í framtíðini verður tað ikki hann, sum skal byggja brýr ímillum partarnar.

- Eg veit væl, at summar av teimum avgerðum, sum Bush, forseti, hevur tikið tey seinastu fýra árini, hava ikki verið væl dámdar í Evropa. Serliga avgerðirnar viðvíkjandi Irak. Men sama hvørjar áskoðanir vit hava havt fyrr og framvegis hava, so ræður um at hyggja frameftir nú. Vit rætta Evropa hondina og vóna, at Evropa tekur í hondina á okkum, segði Powell á tíðindafundi í Bruxelles fyrradagin.

Hann upplýsti samstundis, at George W. Bush, forseti, og Condoleezza Rice, uttanríkisráðharri, koma til Evropa í februar. Tann 22. februar skulu tey hitta umboð fyri tey evropeisku NATO-londini og umboð fyri ES-londini, og síðani skal forsetin vitja fleiri evropeiskar høvuðsstaðir.

- Forsetin leggur stóran dent á at varðveita og styrkja samstarvið tvøårtur um Atlansthavið, segði Colin Powell.

Politiskir eygleiðarar í Bruxelles siga, at avgerðin hjá Bush at hitta ES-leiðararnar tann 22. februar er uttan iva ein amerikonsk viðurkenning av, at tað er umráðandi at hava gott uttanríkispolitiskt samstarv við ES.

### Týskt øl

Colin Powell tók brosandi ímóti øllum teimum mongu takkarorðunum og góðynskjunum á NATO-høvuðsborgini. Men hann sópaði kortini ikki trupulleikarnar undir gólvteppið, sum onkur annar ivaleyst hevði gjørt ein tilíkan dag.

Hann fekk fleiri gávur, men tann mest sermerkta var frá Joschka Fischer, sum gav Powell ein kassa av øli. Fischer segði, at sum amerikanskur hermaður í Týsklandi var tað serliga eitt slag av øli, sum Powell dámdi væl, og tí hevði hann tikið ein kassa av hesum ølinum við sær at geva Powell.

Powell takkaði fyri ølkassan og avdúkaði, at hetta var ikki fyrstu ferð, at hann hevði fingið eina gávu frá Joschka Fischer.

- Eg segði honum einaferð, at mær dámdi serliga væl eitt ávíst slag av týskum øli, og hann sendi mær ein kassa. Tað smakkaði væl, og tá eg veit, at hann er limur í umhvørvisflokkinum Teimum Grønu, sendi eg honum tær tómu fløskurnar aftur, greiddi Powell frá.

## Colin Powell

Føddur í Bronx í New York í 1937. Foreldur hansara vóru av Jamaica.
Var tvær ferðir í Vietnam sum hermaður.
Gjørdist trygdarpolitiskur ráðgevi undir Ronald Reagan, forseta.
Fór úr amerikanska herinum í 1993.
Síðst í nítiárunum vóru tað fleiri, sum vildu hava hann at stilla upp til forsetaval, men hann vildi ikki.
Bleiv í 2001 tilnevndur uttanríkisráðharri og er tann fyrsti afro-amerikanski uttanríkisráðharrin, sum USA hevur havt.